# Kabarett á Glyvrum

**Sunnudagin og mánadagin verður Eystanstevnu-kabarett í Glyvra skúla**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eystanstevnu-kabarettin, sum Mentanarhúsfelagið í Runavíkar kommunu skipar fyri, hevur verið væl umtókt millum fólk.

Sunnudagin, 13. juni og mánadagin, 14. juni, verður kabarettin, sum fólk í økinum hava snikkað saman, sýnd í fimleikarhøllini í Glyvra skúla. Sunnudagin verður sýningin klokkan 17, og mánadagin fara tey á pallin klokkan 20.

Kostnaðurin fyri at síggja kabarettina er 80 krónur.

Á skránni er ymiskt til skemtunar, og eitt nú kunnu vit avdúka, at streep-tease verður at síggja. Hvør streep-teas'in verður, fara vit ikki at avdúka, men vit kunnu siga so mikið, at hon er ikki eitt konufólk, men ein kendur maður í Runavíkar-økinum.

# Støkk í essinum á Eystanstevnu

**Støkk hevur nógv ymisk tiltøk á skránni til Eystanstevnuna í ár. Umframt at vera við á tivoliøkinum við tombola og loppumarknaði, verður stórur eystanstevnudansur leygarkvøldið í ítróttarhøllini í Runavík og gamlamannadansur í Støkkhøllini leygarkvøldið. Skipað verður eisini fyri fimleikaframsýning í Ítróttarhøllini í Runavík sunnudagin**



*Myndin er av føroyameistarunum hjá fimleikarfelagnum, Støkk, sum er eitt av størstu ítróttarfeløgunum í Eysturoynni. Á Eystanstevnu, sum verður um vikuskiftið, luttekur felagið aktivt og tekur sær av nógvum ymiskum tiltøkum*

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fimleikafelagið Støkk er við sínum 450 aktivu limum eitt av størstu ítróttarfeløgum í Eysturoynni. Hetta fimleikaárið vóru 25 lið við styrkivenjing, reiðskapsfimleiki og rútmiskum fimleiki undir leiðslu av 40 venjarum.

### Árið ið fór

Í mars var stórkapping í rútmiskum fimleiki í Runavík, har liðini hjá Støkk stóðu seg væl. Kappingin var sera jøvn og liðini hjá Støkk blivu øll nummar 2 og fingu silvurheiðursmerkir.

Í apríl og mai vóru so reiðskapskappingarnar á Rituvíkarhálsi. Her gjørdust fimleikararnir hjá Støkk føroyameistarar í øllum bólkunum.

Aftur í ár hevði Støkk tvær væleydnaðar framsýningar við 1200 áskoðarum í ítróttarhøllini í Runavík.

### Eystanstevnan

Støkk hevur nógv ymisk tiltøk á skránni í ár. Umframt at verða við á tivoliøkinum við tombola og loppumarknaði, verður stórur eystanstevnudansur leygarkvøldið í ítróttarhøllini í Runavík og gamlamannadansur í Støkkhøllini leygarkvøldið.

Sunnudagin verður fimleikaframsýning í ítróttarhøllini í Runavík. Framsýningin verður fjølbroytt við nógvum góðum fimleikarum, gestaliðum og eisini verður okkurt spennandi til børnini.

### Vælkomin!

Fimleikafelagið Støkk bjóðar øllum at vera hjartaliga vælkomin á Eystanstevnu 2004 í Runavík.

– Vónandi fáa vit øll eina góða stevnu, eru ynskini hjá fimleikarfelagnum.

# Skótarnir seta sín dám á Eystanstevnuna

**Úlvar og skótar eru sjónligir við eitt nú at luttaka í skrúðgongum á grækarismessu, flaggdegi og á Eystanstevnu**

EYSTANSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skótaliðið heldur til í kjallarahæddini í Missiónshúsinum á Glyvrum, har úlvar og skótar hittast hvørt mánakvøld til fundar. Umframt hesar fundir, verða árligar legur hildnar, eitt nú ein jólalega á Kambsdali og ein várlega á Selatrað.

– Við hesum virksemi roynir skótaliðið, sum byggir á kristið grundstøðið, at menna tann einstaka á øllum økjum, bæði kropsliga, sálarliga og fatanarliga, sigur skótaliðið á Glyvrum.

### Legur uttanlands

Viðhvørt sleppa eldru skótarnir eisni á legur uttanlands.

– Vit hava havt luttakarar á slíkum legum í eitt nú Danmark, Noregi, Finlandi, Hálandi, Chili og Thailandi, sigur skótaliðið.

Fyri stuttum luttóku nakrir skótar á gonguferðini, "Sandoynna runt".

– Hetta var ein sera krevjandi ferð, har fjallstavur og presending vóru einasta útgerð til bústaðin. Her stóðu okkara skótar seg væl, sigur skótaliðið.

### Sjónligir skótar

Úlvar og skótar eru sjónligir við eitt nú at luttaka á skrúðgongum á grækarismessu, flaggdegi og á Eystanstevnu.

– Av øðrum uttandura virksemi hjá skótaliði okkara kann nevnast træplanting við kirkjuna í Rytuvík og umvælingar av varðagøtum í økinum.

Skótaliðið á Glyvrum hevur umleið 100 limir í bygdunum Rytuvík, Æðuvík, Nesi, Toftir, Runavík, Saltangará, Glyvrar, Søldarfirði og Skipanes.

*Forðarenning fyri úlvar í ánni á Selatrað í apríl 2004*





*Skótar á ferð kring Sandoynna í mai 2004*



*Helgi Hvannastein, Gunnleivur og Julius Biskopstø avmyndaðir uttan fyri Miðla og Samskiftishølini hjá Tekniska skúla í Klaksvík dagin fyri sjálva próvtøkuna. Gunnleivur heldur í skrivligu frágreiðingini um verkætlanina*

# Skúlanæmingar gjørt film

**Í gjár fóru tríggir ungir mans til próvtøku á tekniska skúla í Klaksvík. Evnið hjá teimum var ein verkætlan, sum teir hava arbeitt við í eina tíð. Teir hava gjørt ein film, sum somuleiðis er ein lýsingarherferð ímóti kriminaliteti undir heitinum Alt byrjar í smáum**

PRÓVTØKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Gunnleivur Biskopstø, Helgi Hvannastein og Julius Biskopstø hava verið til roynd í lærugreinini Tøkni. Hendan lærugreinin er undir breytini Miðlar og Samskifti, sum sá dagsins ljós fyri fyrstu ferð á skúlanum í fjør.

Próvtøkan hjá teimum má sigast at hava verið í eini heldur øðrvísi verkætlan. Í mars mánaði fóru teir í gongd við at gera ein film. Ikki nakran langan film, men ein film, sum hevur ein greiðan boðskap. Søgugongdin er í stuttum hon, at ein drongur kemur inn á eina Statoilstøð. Krambakallurin fer út úr handlinum eina løtu, og tað er nóg mikið til, at drongurin verður lokkaður til at stjala. Krambakallurin varnast tað, men drongurin flýggjar við tí, sum hann hevur stolið. Komin út úr sølubúðini tekur hann ein bil og koyrir avstað - undan løgregluni.

Filmurin endar við, at drongurin verður kroystur í ein krók av løgregluni, og tá kemur ein tekstur fram á myndina. Hví seta teg sjálvan í hesa støðuna.

### Herferð

Teir tríggir greiða frá, at verkætlanin hjá teimum er ein herferð ímóti kriminaliteti. Teir hava sjálvir funnið upp á hetta og gjørt filmin úr einum enda í annan.

– Vit hava eisini gjørt tað soleiðis, at tað sær út sum um hetta er gjørt í samstarvi við Fyribyrgingarráðið. Tað er sjálvandi fiktivt, men als ikki óveruligt, siga teir.

Filmurin eitur alt byrjar í smáum, og tað er somuleiðis heitið á verkætlanini, sum teir vardu á skúlanum fríggjamorgunin.

Julius og hinir greiða frá, at hetta ikki bert er ein filmur. Her er talan um eina herferð við bæði plakatum og øðrum, har filmurin tó er miðdepulin.

– Alt verður gjørt út frá boðskapinum í filminum, sigur Gunnleivur.

### Egin framleiðsla

Vanligt er til eina próvtøku, at tað skal ein rúgva av fyrireiking til. Og er hendan í so máta onki undantak. Munurin er bara hann, sambært teimum trimum, at fyrireikingin hevur staðið upp á allatíðina, meðan teir hava arbeitt við verkætlanini.

– Tað er ikki tað sama nú. Og so nógv hugaligari, tá tú hevur verið í prosessini allatíðina. Vit hava jú gjørt og framleitt hetta úr einum enda í annan, so tað sigur seg sjálvt, at vit áttu at havt gott innlit í tí, sum liggur her á borðinum, sigur Gunnleivur og peikar á skrivligu frágreiðingina.

Tó vita teir, at tað finnast nakrir veikleikar í henni, og tað tóku teir fram til munnligu próvtøkuna.

– Tað er altíð gott sjálvir at vísa á teir veikleikar, sum vit vita av, tí próvdómarin setur jú sjálvandi kritiskar spurningar, sigur Julius.

### Læruríkt

Allir tríggir eru teir samdir um, at hesin arbeiðshátturin hevur verið sera mennandi og læruríkur.

– Eitt, sum eg so sanniliga havi funnið út av og eri komin betur til at skilja, er hví Sjónvarp Føroya ikki framleiðir so nógv føroyskt tilfar, sigur Gunnleivur.

Tað tekur ótrúliga langa tíð at framleiða nakrar fáa minuttir, og tað skulu øgiliga nógv fólk til.

– Rulluteksturin hjá okkum er alvorliga langur við øllum teimum, sum á ein ella annan hátt hava hjálpt til, sjálvt um filmurin bara er tríggjar minuttir, greiðir Helgi frá.

Skemtandi siga teir eisini, at tað negativa er, at teir aldrin aftur fara at kunna hyggja at einum vanligum filmi í biografi ella sjónvarpinum uttan at finna mistøk.

– Allir filmar hava mistøk, men nú duga vit so nógv betur at fáa eyga á teir, sigur Gunnleivur.

Teir hava umframt hesa próvtøkuna, sum teir júst hava verið til, tvær eftir. Og so skuldi bæði húgva og prógv verið teimum í hendi.

Lærari hjá teimum í Tøkni er Olga Biskopstø, og siga teir, at hon hevur verið teimum ein dyggur stuðul í teirra arbeiði.

Hvat framtíðin fer at vísa, vita teir ikki rættuliga. Men Helgi og Julius hava hug at fara at útbúgva seg innan telduheimin, meðan Gunnleivur meira hellir seg til miðlarnar.

# Yvir 9.000 undirskriftir fyri Peturi



*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjamorgunin handaði forkvinnan í MBD/-DAMP felagnum, Bára Johansen, landsstýrismanninum í almannamálum Hans Paula Strøm 9.410 undirskriftir frá fólki kring alt landið, sum vilja mótmæla, at Petur verður sendur av landinum til viðgerðar fyri atferðatrupulleikar.

Søgan um lítla Petur er tragisk, og hon hevur nógv frammi í fjølmiðlunum seinastu tíðina. Og nú hevur so felagið savnað undirskriftir og handað landsstýrismanninum tær.

– Eg haldi annars, at tykist sum um at Hans Pauli ger sítt í hesum málinum, sigur Bára Johansen.

Hon heldur, at søgan um lítla Petur er langt úti, og hon vónar, at hann fer at kunna verða verandi í Føroyum hjá ommu og abba sínum í sínum kenda umhvørvi.

**- sae -**

# Vælgerandi konsert

Sunnukvøldið klokkan 20 verður ein vælgerandi country og gospel konsert við Magna Christiansen í ítróttarhøllini á Hálsi. Tað er MBD/DAMP felagið, sum skipar fyri konsertini til frama fyri børn við ósjónligum breki.

Konsertin verður ókeypis, men skipað verður fyri innsavnan av pengum. Allur peningurin fer óskerdur til ein stovn til børn við ósjónligum breki.

VERKSTAÐUR
J.C. Svabosgøta 60 til leigu



TEL 31 41 07